**Bill Justinussen**
**Jenis av Rana**
**løgtingsmenn**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 78/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunustýri (Kommunustýrislógin)** (Viðvíkjandi borgarstjórum, sum sita í øðrum beinleiðis fólkavaldum starvi)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunustýri (Kommunustýrislógin)**
(Viðvíkjandi borgarstjórum, sum sita í øðrum beinleiðis fólkavaldum starvi)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003, verður § 6, stk. 2, 5. pkt. orðað soleiðis:

"Borgarstjóri kann tó røkja onnur størv, sum eru beinleiðis fólkavald."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar:**
Skotið verður upp at strika ásetingina í kommunustýrislógini, sum kann forða einum borgarstjóra í fulltíðarstarvi at røkja starv sum fólkavaldur løgtingsmaður ella fólkatingsmaður. Broytingin inniber, at tað hereftir ikki liggur í hondunum á einum meiriluta í einum kommunustýri at eiga avgerðina, um ein borgarstjóri í heilum starvi kann røkja annað fólkavalt starv.

Tað er grundleggjandi í okkara fólkaræði, at tey, sum lata seg stilla upp til fólkavalt umboð, kunnu taka á seg tað starv, sum tey eru vald til. Ein borgarstjóri í fullum starvi, sum verður valdur á ting, eigur at kunna taka á seg tingmannastarvið, uttan at fáa loyvi frá einum meiriluta í einum kommunustýri til tess. Uppskotssetararnir meta tað vera í stríði við okkara fólkaræði, at eitt stórt tal av fólki kann velja ein persón inn á ting, sum síðani av nøkrum fáum fólkum í einum kommunustýri verður noktaður at taka á seg starvið. Um lóggávan vil nokta einum borgarstjóra at gerast tingmaður, eigur vallógin at broytast, so ein borgarstjóri ikki kann stilla upp til løgtingsval. Men júst tað er heldur ikki í samsvari við okkara fólkaræðishugsan. Tí er skipanin endað í eini støðu, sum ger seg inn á okkara fría fólkaræði. Tey fólkini, sum velja ein borgarstjóra á tingvali, gera tað fult vitandi um, at viðkomandi er borgarstjóri, og tí fer at hava tvey fólkavald størv, um hann verður valdur. Tí er tað at gera seg inn á teirra val, um ein meiriluti í einum kommunustýri noktar teirra umboði sæti á tingi.

Tað er á tingi, at lógir verða smíðaðar. Ein borgarstjóri umsitur eftir teimum lógum, sum eru gjørdar á tingi. Løgtingið er evsta vald í landinum, og kann tað tí ikki á nakran hátt vera rætt at nokta einum, sum er valdur á ting, sæti til frama fyri annað fólkavalt starv, sum eru undir evsta valdi.

Skuldi skipanin havt ta felags niðurstøðu, at ein fólkavaldur bara skal røkja eitt starv, kundi rætta valið eins væl ella heldur verið at nokta tingmanni onnur fólkavald størv, so leingi hann sat á tingi. Tað er ein annar spurningur, sum støða ikki verður tikin til í hesum uppskoti.

Uppskotið hevur ikki nakrar beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri landið ella kommunurnar. Uppskotið hevur ikki verið sent til ummælis.

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Við hesari broytingini verður tað ikki longur upp til kommunustýrið at gera av, hvørt borgarstjóri í fulltíðarstarvi kann røkja annan beinleiðis fólkavaldan álitissess. Broytingin fevnir bert um beinleiðis fólkavald størv og ikki um onnur størv.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingi 16. januar 2018**

Bill Justinussen | Jenis av Rana